HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavnar kommuna
Postrúm 32
Vaglið
FO-110 TÓRSHAVN

Tórshavn, hin 12. mai 2003
Málnr.: 614-200200104-11
Tykkara málnr.:
Málsviðgeri: EE / Tlf.: 35 64 20

# UMHVØRVISGÓÐKENNING
# AV
# REINSIVERKINUM VIÐ SERSJANTAVÍKINA


1 Góðkenning .......... 2

2 Umsóknin .......... 2
- 2.1 Viðkomandi tekningar .......... 2

3 Lýsing av virkseminum .......... 3

4 Málsviðgerð .......... 3

5 Góðkenningartreytir .......... 3
- 5.1 Innrætting og rakstur .......... 3
- 5.2 Óljóð .......... 4
- 5.3 Luftútleiðing .......... 4
- 5.4 Vatn og spillvatn .......... 4
- 5.5 Innaneftirlit .......... 4
- 5.6 Óhapp .......... 5
- 5.7 Rakstrarskráseting / Umhvørvisfrágreiðing .. 5

6 Almennar treytir .......... 5

7 Kæruvegleiðing .......... 6

# 1 Góðkenning

Við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 og grein 1, stk. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994, um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, verður við hesum sagt frá, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann veita umhvørvisgóðkenning til Reinsiverkið við Sersjantavíkina hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisgóðkenning verður givin við teimum treytum, sum eru lýstar í partinum um "Góðkenningartreytir" niðanfyri.

# 2 Umsóknin

Heilsufrøðiliga starvsstovan fekk tann 25. februar 2002 umsókn um umhvørvisgóðkenning til Reinsiverk við Sersjantavíkina frá Tórshavnar kommunu.

Saman við umsóknini og seinni eru móttiknar tekniskar upplýsingar um reinsiverkið og útleiðingar, umframt tekningar og upplýsingar um tíðarætlanir.

## 2.1 Viðkomandi tekningar

- Kort við matrikulering, tekning TK – 01.
- Kort við kloakering í Eysturbýnum, og sum vísir upplendið til reinsiverkið, tekning TK – 02.
- Yvirlitsplanur, tekning 728-201.
- Lendisplanur, tekning 728-202.
- Planur og málseting, tekning 728-203.
- Skurður A, B og C av reinsiverkinum, tekningarnar 728-204, 728-205 og 728-206.
- Sandfang og yvirrenning – planur og skurður, tekning 728-207.
- Skurður 1, 2 og 3 í lendi, tekning 728-208.
- Longdarskurður Br. 1 – Br. 2, tekning 728-209.
- Tvørskurðir í kloakk, tekning 728-210.
- Trappurúm og gangibrúgv; ventilatión, sanitet og el; planur og skurður, tekning 728-211.
- Trappurúm, gongubrúgv og stigi; tvørskurður, tekning 728-212.
- Reinsiverk, tvørskurður; armeringstekning, tekning 728-213.
- Reinsiverk; samankomingar, botnur, veggir og tak, tekning 728-214.

Eitt uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent kommununi til viðmerkingar 6. september 2002. Tórshavnar kommuna hevði viðmerkingar til fleiri av treytunum. Millum annað til treytina um at frárenningin frá reinsiverkinum skuldi leiðast út í rúman sjógv. Eftir ein fund millum umboð frá Tórshavnar kommunu og Heilsufrøðiligu starvsstovuna, var niðurstøðan tann, at kommunan skuldi gera eina heildarætlan fyri, hvussu útleiðingin frá reinsiverkinum innan 1. november 2005 kundi verða leidd út í rúman sjógv (sí Heildarætlan HS-málnr.: 614-200200104-6). Heildarætlanin er síðan góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

# 3 Lýsing av virkseminum

Reinsiverkið er staðsett undir jørð á matr. nr. 620c og 600a, sum Tórshavnar kommuna eigur. Partur av arbeiðinum fer fram inni á øki sum smb. almennu byggisamtyktini er frílendi D1, meðan partur av arbeiðinum fer fram inni á øki, sum er vinnuøki B6. Økið er friðað, og skal tí alt setast aftur í upprunaligan stand, tá arbeiðið er liðugt. Yvirfriðingarnevnd Føroya hevur góðkent byggiætlanina, somuleiðis hava fornminnismyndugleikarnir góðkent ætlanina.
Gjørt verður nýtt kloakkreinsiverk og eftirlitstunnil millum reinsiverk og verandi kloakktunnil. Reinsiverkið verður bygt upp sum ein heild – alt undir jørð. Tað er í trimum høvuðspørtum:

1. Sandfang og yvirrenning við ristskipanum
2. Størri forfellikamar
3. Minni eftirfellikamar

Harumframt er atkoma til tøming, eftirlit og viðlíkahald. Regluliga tømingin verður væntandi 9. hvønn mánaða.

Upplendið til reinsiverkið er býtt í tvey økir, sum samanlagt geva ein belastning uppá 955 PE:

| | | |
|---|---|---|
| Øki Ia | Frúutrøð – Jónas Broncksgøta | 630 PE |
| Øki Ib | Djóna í Geilsgøta | 325 PE |

(sí eisini tekning TK-02, HS málnr.: 200200104-1)
Kommunan metir at reinsiverkið er dimensionerað til umleið 1000 PE.

Kloakeringin í hesum býarparti er felagskloakering, t.v.s. talan er um bæði skittvatn og regnvatn. Mesta regnvatnsmongdin er fastløgd útfrá mátingum, ið SEV hevur gjørt. Roknað er við í mesta lagi 25 mm av avfalli um tíman. Yvirrenning væntast sostatt 15% av tíðini. Annars er reinsiverkið dimensionerað eftir norðurlendskum normum.

# 4 Málsviðgerð

Undir viðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- At útleiðingin frá reinsiverkinum er í samsvar við krøv til kommunalar spillvatnsleiðingar
- At tøming og rakstur annars er soleiðis at reinsiverkið reinsar optimalt

# 5 Góðkenningartreytir

## 5.1 Innrætting og rakstur

5.1.1 Reinsiverkið skal verða staðsett og rikið soleiðis sum sagt er frá í umsóknini.
5.1.2 Eftir at reinsiverkið er liðugt, skal alt burturkast frá arbeiðinum burturbeinast í samsvari við galdandi kunngerð um burturkast, og økið rundan um reinsiverkið skal hampast.
5.1.3 Øki, sum hoyra til reinsiverkið, skulu vera týðuliga merkt.
5.1.4 Reinsiverkið skal vera undir regluligum eftirliti av kommununi og tømast fyri evju eftir tørvi, soleiðis at reinsingin altíð er mest møgulig. Fyrsta tømingin skal í seinasta lagi vera 9 mánaðir eftir at reinsiverkið er tikið í nýtslu. Við fyrstu tøming skal metast um neyðugt er at tøma oftari.

5.1.5 Evja sum verður tømd úr reinsiverkinum skal leggjast á góðkent evjupláss.

5.1.6 Alt sum verður skilt frá spillvatninum við innleiðingina til reinsiverkið skal beinast burtur eftir tørvi, soleiðis at ristin ikki tippist, og latast góðkendum móttakara til brenning.

## 5.2 Óljóð

5.2.1 Raksturin á staðnum má ikki hava við sær, at óljóðstøðið, ásett sum tað ekvivalenta, korrigeraða óljóðstøðið í dB(A), fer upp um niðanfyri standandi mørk máld við næsta grannamark. Í krøvunum veldst tað um, hvat økini rundan um verða nýtt til.

| Dagur | Tíð | Øki 1 | Øki 2 | Øki 3 | Øki 4 |
|---|---|---|---|---|---|
| Mán. – frí. | 07.00 - 18.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygar. | 07.00 - 14.00 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mán - frí. | 18.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygar. | 14.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Halgi. | 07.00 - 22.00 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allir dagar | 22.00 - 07.00 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki og havnarøki, har larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 2: Vinnuøki og havnarøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram.
Øki 3: Blandað bústaðar- og miðstaðarrøki.
Øki 4: Bústaðarøki.

5.2.2 Tað hægst loyvda løtuvirðið fyri óljóð frá verkinum í tíðarskeiðnum kl. 22-07 kann í mesta lagi fara 15 dB(A) upp um tey nevndu markvirðini á nevndu økjunum.

## 5.3 Luftútleiðing

5.3.1 Avkastluft sum verður sogin úr reinsiverkinum má ikki hava við sær luktampar.

5.3.2 Um ampar vera av lukti, skulu avmarkandi tiltøk setast í verk.

## 5.4 Vatn og spillvatn

5.4.1 Frárenning frá vaski í trappurúminum skal leiðast í reinsiverkið.

5.4.2 Innan 1. november 2005 skal kommunan hava gjørt eina lokaða skipan, sum leiðir alt spillvatn frá reinsiverkinum út í rúman sjógv, soleiðis at ongin sjónlig dálking er, hvørki á sjónum ella á botnum. Skipanin skal verða gjørd sambært heildarætlanini hjá kommununi (HS-málnr.: 614-200200104-6)

5.4.3 Munnin á nýggju spillvatnsútleiðingini skal vera í minsta lagi 1 metur undir á hægstu fjøru.

5.4.4 Kommunan skal gera eina skipan til sýnistøku av spillvatninum, sum verður leitt út á sjógv. Skipanin skal kunna taka flóðproportional samdøgurssýni av í minsta lagi 90 % av spillvatnsnøgdini.

## 5.5 Innaneftirlit

5.5.1 Sum innaneftirlit skal kommunan taka í minsta lagi 4 flóðproportional samdøgurssýni, og í minsta lagi 4 staksýni av reinsaða spillvatninum árliga. Sýnini skulu takast javnt býtt yvir alt árið.

5.5.2 Spillvatnið skal kannast fyri:

| Evni | Kanningarháttur |
|---|---|
| Olja (mineral) | DS/R 208, staksýni |
| Olja/feitt | DS/R 208, staksýni |
| Botnfelliligt evni | DS 233, flóðproportional |
| Suspenderað evni | DS 207, flóðproportional |
| PH | Elektrodur og/ella samanhangandi máting |

5.5.3 Fyri at tryggja at ongin sjónlig dálking er, skal kommunan, í seinasta lagi 4 ár eftir at góðkenningin er givin, gera eina resipientkanning, har mett verður um útbreiðslu og tjúkd av botnfeldum evnum. Harafturat skulu gerast kanningar av streymviðurskiftum, fyri at vísa hvar streymurin førir útleiddu evnini.

5.5.4 Títtleikin av kanningum kann verða broyttur av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

5.5.5 Allar sýnistøkur og kanningar skulu gerast av starvsstovu, sum er góðkend av Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

5.5.6 Allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum verða goldnar av kommununi.

### 5.6 Óhapp

5.6.1 Henda óhapp, sum hava dálking við sær, skulu beinanvegin setast í verk tiltøk, so sum upprudding, avmarking og fyribyrging, til eitt støði, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan kann góðtaka. Boðast skal frá til umhvørvisdeildina á Heilsufrøðiligu starvsstovuni beinanvegin.

### 5.7 Rakstrarskráseting / Umhvørvisfrágreiðing

5.7.1 Kommunan skal føra rakstrarbók, ið skal innihalda hesar upplýsingar:

a. Avhendaðar nøgdir fyri hvørja tøming av evju úr reinsiverkinum og móttakari.
b. Avhendaðar nøgdir av burturkasti til brenning og móttakari.
c. Rakstraróhapp, herundir eisini yvirrenning, og møgulig orsøk.
d. Móttiknar kærur um lukt, óljóð ella annað í samband við raksturin av reinsiverkinum.
e. Úrslit av spillvatnskanningum.
f. Úrslit av resipientkanning.

5.7.2 Allar skrásetingar skulu goymast í minsta lagi 5 ár og skulu vera til taks hjá eftirlitsmyndugleikanum.

5.7.3 Árlig umhvørvisfrágreiðing við uppgerð av rakstrarskrásetingum og frágreiðing um umhvørvisviðurskifti, tulking av kanningarúrslitum, óhapp, gjørd og ætlað umhvørvistiltøk v.m. skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni í seinasta lagi 1. februar í avloysandi árinum.

## 6 Almennar treytir

Reinsiverkið má ikki víðkast ella broytast byggifrøðiliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið nertir við dálkingarviðurskifti verkisins, fyrr enn nýggj góðkenning er givin til hesa víðkan ella broyting.

Eigaraskifti, navnabroyting eller avtøka skal fráboðast Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur eftirlitið við reinsiverkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Heilsufrøðiliga starvsstovan kann broyta eftirlitstreytirnar, um hildið verður, at hetta er neyðugt fyri at fremja eitt munadyggari eftirlit.

Eitt eintak av hesi góðkenning skal altíð vera tøkt á reinsiverkinum. Øll viðkomandi starvsfólk skulu kenna innihaldið í góðkenningini og vita, hvar góðkenningin er til taks.

Annað umhvørvistyngjandi virksemi enn tað, sum er lýst í umsóknini, má ikki fara fram. Um ivamál taka seg upp, ger myndugleikin av, hvat umhvørvistyngjandi virksemi er.

Í 5 ár eftir at góðkenningin er givin kann bert verða givið boð ella forboð, um so er, at:

- nýggjar upplýsingar eru komnar fram um dálkingarskaðaárin.
- dálkingin elvir umhvørvislig skaðaárin, ið ikki kundu síggjast frammanundan, tá ið góðkenningin varð givin.
- dálkingin í aðrar mátar verður størri enn hon, ið góðkenningin er givin eftir.

Tá ið meira enn 5 ár eru gingin eftir góðkenningina, kann Heilsufrøðiliga starvsstovan broyta treytirnar í hesi, tá ið tað er umhvørvisliga grundað.

Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

## 7 Kæruvegleiðing

Hendan avgerð kann sambært grein 66 í løgtingslóg nr. 134 um umhvørvisvernd frá 29. oktober 1988 kærast til Landsstýrismannin í umhvørvismálum. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Landsstýrismannin í umhvørvismálum við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Bárður Enni, stjóri

/

Jacob Pauli Joensen, deildarleiðari

**Avrit:** Arbeiðseftirlitið, Postrúm 1134, FO-100 Tórshavn
Føroya landsstýri, Vinnumálastýrið, Postrúm 377, FO-100 Tórshavn
Føroya landfúti, Postrúm 3018, FO-110 Tórshavn
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn
Landsdjóralæknin, Postrúm 139, Tinganes, FO-110 Tórshavn
Tórshavnar kommuna, Vaglið, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn.